## § 13. SAMLAGSTRYGGING

Lívstrygging: Við deyða verður útgoldið soleiðis

Limir, til og við 50 ár kr. 800.000,-
Tryggingarupphæddin lækkar javnt eftir fylta 51. ár, við kr. 25.000,00 árliga og fellur burtur við fylta 67. ár.

Doyr hjúnafelagi/sambúgvi* hjá tryggjaðum limi, verður útgoldið helvtin av teirri lívstryggingarupphædd, ið er galdandi fyri limin.
*Vísandi til galdandi tryggingartreytir fyri samlagstrygging.*

**Ávísar hættisligar sjúkur**: Útgoldið verður sambært tryggingartreytum fyri "ávísar hættisligar sjúkur".

| | |
|---|---|
| Tryggingarupphædd hjá liminum | kr. 150.000,- |
| Tryggingarupphædd hjá børnum | kr. 150.000,- |

Møguligt útgjald í samband við hættisliga sjúku verður ikki mótroknað í veitingini við deyða.

Tryggingin fyri "ávísar hættisligar sjúkur" tekur við frá eftir innliman, sambært ásetingunum í § 4.

Hoyritól**:** Fær limur játtað hoyritól frá Almannastovuni, gevur hetta samstundis rætt til eitt útgjald frá tryggingini. Útgoldið verður sambært játtan frá Almannastovuni og rokning frá veitaranum. Almannastovan rindar í mun til teirra lógarheimild, meðan tryggingin síðani rindar upp til veruliga kostnaðin, tó í mesta lagi kr. 4.000,- fyri hvørt hoyritólið sær.

Samlagstryggingin er bundin fyri teir limir, ið mánaðarliga rinda pensjónsgjald til LÍV. Fyri teir limir, ið ikki rinda til pensjónsskipan í LÍV, er samlagstryggingin sjálvboðin.

Sjálvboðin samlagstrygging: Ynskir limur, at verða innlimaður í sjálvbodnu samlagstryggingina, skal hetta fráboðast LÍV, umvegis felagið. Limurin skal útfylla áheitan um samlagstrygging, ið verður send til LÍV saman við avriti av serligu læknaváttan fyri sjófólk (bláa bók). Um limur ikki hevur læknaváttan fyri sjófólk, skal heilsulýsing latast LÍV til støðutakan.
Tryggingin tekur við tann dag LÍV móttekur avrit av læknaváttan fyri sjófólk ella heilsulýsing, treytað av, at hendan er nøktandi.

Limurin rindar sjálvbodnu samlagstryggingina mánaðarliga, umvegis gjaldsskipan.

Um so er, at limurin rindar pensjónsgjald til LÍV, er ikki møguligt at tekna sjálvbodna samlagstrygging. Samlagstrygginginargjaldið verður tá goldið av pensjónsinngjaldinum. Somuleiðis verður møgulig sjálvboðin samlagstryggingin strikað, um limur seinni rindar pensjónsinngjald í LÍV.

Inngjaldstrygging: Missir limur 2/3 ella meira av arbeiðsorku síni, fellur tryggingargjaldið burtur aftaná 3 mánaða óarbeiðsføri. LÍV rindar tryggingargjaldið, so leingi óarbeiðsføri stendur við. Um neyðugt, verður goldið til 67 ára aldur.